## Tottenham-fjepparar fylkjast

Fjepparafelagið Tottenham Hotspurs - Faroe Islands Branch verður stovnað leygardagin í samband við Premier League dystin millum Tottenham Hotspurs og Manchester United á White Hart Lane í London. Hølið, ið er valt til stóra tiltakið, er Sendistovan, sum liggur har J. Paturssonargøta og Grønlandsvegur møtast. Tiltakið í Sendistovuni byrjar kl. 16.30, og løtu seinni fara Tottenham-fjepparnir at hyggja eftir dystinum millum Spurs og United. Stigtakarnir hava fyrireikað seg væl, og hava fingið øll blástempul frá móðirfelagnum, sum krevjast fyri at fáa føroyska fjepparafelagið viðurkent. Føroyska fjepparafelagið lúkar allar treytir, sum Tottenham Hotspurs krevur av einum slíkum.

## Nýtt met til Pál

Pál Joensen setti í gjár nýtt føroyskt met í 400 metrar frísvimjing í EM-kappingini í Kroatia. Men tað var ikki nóg mikið til at koma í finaluna í kappingini. Pál Joensen svam teir 400 metrarar í tíðini 3 minuttir 42,57 sekund, og hetta gav honum eitt 13 pláss í kappingini, og tað svaraði til tilmeldingina hjá honum. Shaila millum Garðarnar var í gjár við innleiðandi kapping í 100 frísvimjing. Hon svam í tíðini 58,21 sekund og endaði sum nummar 51. Kári á Høvdanum hevur roynt seg í 100 metrar firvaldasvimjing. Tíðin gjørdist 58,27, og tað var nakað betri enn tilmeldingartíðin.

# Noreg møtir Russlandi í hálvfinaluni

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

**Spania og Týskland spæla í hinari finaluni. Danski venjarin er ikki í iva um, at Noreg vinnur EM**

Norsku kvinnurnar vóru longu klárar til hálvfinaluna, tá næstsíðsta umfarið varð spælt, men enn varð eftir at tryggja sær 1. plássið, og síggja hvønn Noreg skal takast við í hálvfinaluni. Noreg vann aftur greitt ígjár, hesaferð 37-31 ímóti Rumenia. Spania vann 23-21 á Ungarn, meðan Danmark endaði illa við at tapa 25-30 ímóti Ukraina. Spania tók soleiðis hálvfinaluplássið frá Rumenia, og skulu tær spæla ímóti Týsklandi í aðrari hálvfinaluni. Hin finalan verður millum Noreg og Russland. Russland tapti 22-27 ímóti Týsklandi. Makedonia vann 29-24 á Hvítarussland. Svøríki tapti somuleiðis 29-24 ímóti Kroatia. Svøríki og Danmark endaðu sostatt næstaftast og aftast í høvuðsumfarinum, og hava bæði liðini víst eitt ógvuliga svingandi spæl.

### Byrjaðu væl

Hesaferð byrjaðu norsku kvinnurnar dystin betri, enn tær gjørdu ímóti Danmark og Ungarn. Tær tóku leiðsluna tíðliga í dystinum, og sleptu henni ikki aftur. Norska liðið spældi væl, og eydnaðist serliga væl við kontraálopunum. Norska liðið hevði tamarhald á støðuni, og førdi 19-14 í hálvleikinum. Í 2. hálvleiki eydnaðist tað at halda fast við fjarstøðuna, so munurin gjørdist 6 mál. Norski venjarin, Marit Breivik er spent uppá at møta Russlandi í hálvfinaluni, sum verður spæld leygardagin kl. 15.30. – Tað er altíð spennandi at møta Russlandi. Tað er rættiliga hugtakandi, at tær hava vunnið seg í hálvfinaluna, tá ein hugsar um hvussu stóra útskifting liðið hevur havt. Tað er eingin orsøk hjá okkum at taka lætt uppá uppgávuna, sjálvt um vit hava vunnið á russum fyrr í ár. Tær hava nøkur serlig evnir til at betra seg til endaspøl, og hava tær nógvar góðar spælarar á liðnum, segði Marit Breivik við norska TV2. Breivik rósti eisini sínum liðskipara, Kristine Lunde, sum gekk undan og fikk hinar á liðnum við sær. Kristine Lunde undirstrikar, at tær vildu heldur enn fegnar vinna.



*Danska landsliðið tapti aftur í gjár. Hesa ferð móti Ukraina*

*Mynd: Polfoto/AP*

### Pytlick er vísur

Danski venjarin, Jan Pytlick er ikki í iva um, at Noreg vinnur EM, og tvíheldur, at Noreg hevur nógv tað besta liðið í EM-endaspælinum. Pytlick metir ikki, at onnur lið kunnu bjóða Noregi av. Mikukvøldið hjálpti Danmark Noregi við at vinna á Spania, men Pytlick er ivaleysur í, at norska liðið hevði megnað at spælt seg í hálvfinaluna uttan danska hjálp. – Eg varð glaður fyri at hjálpa Noreg, men tað er als ikki neyðugt at hjálpa Noregi. Noreg er tað besta liðið. Tær høvdu vunnið evropameistaraskapið, áðrenn kappingin fór í gongd, undirstrikar Jan Pytlick, sum heldur, at Noreg hevur eitt komplett lið. – Noreg hevði trupulleikar ímóti Spania, og ímóti okkum í 1. hálvleiki, men tær hava eitt komplett lið. Góða verju, góðar málverjar, og góðar álopsspælarar. Eg dugi ikki at síggja, at nakar kann vinna á Noregi. Pytlick heldur, at aðalmunurin millum Noreg og hini liðini í EM-endaspælinum, er breiddin. – Noreg hevur so nógvar góðar spælarar, at tær kunnu skifta spælarar í hvørjum dysti. Týskland, Russland og hini liðini fáa trupuleikar, tí tey spæla við ov fáum spælarum, meðan Noreg hevur fleiri spælarar at velja ímillum.

### Ikki nøgdur

Jan Pytlick er ikki nøgdur við makedonsku fyrireikingarnar í samband við EM-endaspælið. Hann metir, at nógv hevur verið á amatørstøði. – Eg eri ikki nøgdur, eg haldi ikki, at hetta hevur verið nóg gott. Møguleikarnir fyri upphiting, og kringumstøðurnar hava ikki verið nóg góðar. Tá ein stillar krøv til, at spælarnir skulu verða professionelir, so skulu umstøðurnar eisini verða professionelar. Tað haldi eg ikki, at umstøðurnar eru. Tá Danmark og Noreg spældu, varð eitt annað lið møtt upp í skiftingarrúminum hjá Danmark. Áðrenn dystin máttu donsku kvinnurnar hita upp í frakkum, tí tað varð so kalt í høllini. Spurdur um Makedonia átti at fingið loyv at verið EM-vertsland, svarar Jan Pytlick: - Tað skal eg ikki svara fyri, men teir áttu, ið hvussu er at syrgt fyri betri umstøðum.

## FAKTA

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| Noreg-Rumenia | 37-31 |
| Spania-Ungarn | 23-21 |
| Ukraina-Danmark | 30-25 |
| Týskland-Russland | 27-22 |
| Makedonia-Hvítarussland | 29-24 |
| Kroatia-Svøríki | 29-24 |

## DYSTIR um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 14.12 | 14.30 | StÍF-Kyndil |
| 14.12 | 15.00 | VB-Neistin |
| 14.12 | 15.00 | Stjørnan-Tjaldur |

**Atlantic Airways-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 14.12 | 16.00 | StÍF-Kyndil |
| 14.12 | 16.00 | KÍF-VÍF |
| 14.12 | 16.00 | H71-Neistin |

**Flogbóltur**
**Eik-ligan, kvinnur**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 13.12 | 14.00 | SÍ-TB |
| 13.12 | 14.00 | Dráttur-Fleyr |
| 13.12 | 16.00 | Mjølnir-KÍF |

**Eik-ligan, menn**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 13.12 | 14.00 | Mjølnir-ÍF |
| 14.12 | 14.00 | Fleyr-SÍ |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 224 | 173 | 51 | 14 |
| 2 Stjørnan | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 221 | 161 | 60 | 11 |
| 3 Tjaldur | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 211 | 183 | 28 | 10 |
| 4 Neistin | 8 | 3 | - | 3 | - | 2 | 204 | 185 | 19 | 9 |
| 5 StÍF | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 177 | 246 | -69 | 2 |
| 6 Kyndil | 8 | 0 | - | 0 | - | 8 | 137 | 226 | -89 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 192 | 171 | 21 | 12 |
| 2 H71 | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 184 | 159 | 25 | 10 |
| 3 Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 215 | 200 | 15 | 10 |
| 4 StÍF | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 165 | 166 | -1 | 7 |
| 5 KÍF | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 165 | 191 | -26 | 2 |
| 6 Kyndil | 7 | 0 | - | 1 | - | 6 | 164 | 198 | -34 | 1 |